# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Í blaðnum mikudagin...

**Vegna plásstrot verða fimleikaframsýningin hjá Havnar Fimleikafelag og FM fyri yngri í amboðsfimleiki við í blaðnum mikudagin.**

## Ámund fyri fyrstu ferð

Ámund Nolsøe, B36, varð skiftur inn, tá nakrir minuttir restaðu í av dystinum í Vágum í gjár. Tað var fyrstu ferð, at hann spældi í fremstu røð. Ámund Nolsøe er sonur fyrrverandi B36-kempuna, Tummas Eli Hansen, sum var liðskipari, tá B36 vann føroyameistaraheitið í 1997.

# Sig tína hugsan!

Hvat duga føroyingar illa í ítróttarhøpi? Hvat skulu fjølmiðlarnir varpa meira ljós á? Hvat hendi kring landið um vikuskiftið?

Vit vilja fegin, at tú er við at birta undir stimbrandi kjak um føroyskan ítrótt. Tú er hjartaliga vælkomin at senda Ítróttarsosialinum eina viðmerking um hendingarnar í vikuskiftinum ella føroyskan ítrótt sum heild, sum vit prenta í Ítróttarblaðnum hvønn mánadag.

Vit prenta ikki dulnevndar viðmerkingar.

Send eina viðmerking til uni@sosialurin.fo.

# Landsliðsvenjarin hugdi at

Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur hugt at trimum landskappingardystum um vikuskiftið. Leygardagin var hann til dystin millum EB/Streym og Víking, og hann var millum áskoðararnar í Runavík og Sørvági í gjár.

Millum mest eyðsýndu spælararnar, sum ikki eru í landsliðshópinum, vóru Róaldur Jacobsen, sum var tvífaldur málskjútti, og Christian Høgni Jacobsen, sum noyddist av vøllinum í Runavík við skaða.

Annars sást týðiliga á spælinum, at kappingarárið er akkurát byrjað, og spælararnir skulu venja seg við nýggju viðleikararnar.

*uni@sosialurin.fo*



*savnsmynd*

# Neistin byrjar í Kollfirði

Nú er bara finalurnar um føroyameistaraheitið eftir í bestu mansdeildini og kvinnudeildini í hondbólti.

Mansliðið hjá Neistanum, sum hevur runnið undan hinum alt kappingarárið, spælir fyrru finaluna móti KÍF í Kollafirði. Dysturin verður leygardagin, 16. apríl. Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen skulu døma. Seinni dysturin verður í høllini á Hálsi skírishósdag, 21. apríl. Tá døma Karsten Joensen og Kristian Joensen.

Stjørnan og Neistin bresta saman hjá kvinnunum. Fyrri dysturin verður í høllini á Hálsi leygardagin 16. apríl. Seinni dysturin verður í KÍ-høllini skírishósdag. Tá eru Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen dómarar.

## Úrslitini um vikuskiftið:

Atlantic Airways-deildin:
Kyndil – KÍF 26-25
StÍF – KÍF 36-28
H71 – VÍF 27-31
Neistin – Team Klaksvík 40-21

Sunset-deildin:
Tjaldur – VÍF 33-27
StÍF – VB 24-32
Neistin – Stjørnan 25-18

Samanumtikið hevði NSÍ meiri spæl í dystinum. Men tað var trupult at koma fram til teir heilt stóru kjansirnar móti einum HB liði, sum í stóran mun dúvaði uppá kontraálop. Sum byrjan uppá landskappingina kundu vit ikki ynskt okkum eitt betri úrslit enn ein sigur móti HB heima við Løkin.

*www.nsi.fo*

At runavíksingar kendu vitjunartíðna tá hon beyðst var sera heppið fyri teir og hóast Klæmint Olsen bleiv rikin av vølli móti endanum fyri at lamløsta júst heimaftur komna Rógva Poulsen, hevði tíverri ikki so stóran tíðning.

*www.hb.fo*

Eisini kann okkurt benda á, at B71 verður veikasta liðið, sum KÍ kemur at møta í ár. Tó skal einki takast frá spælinum, sum var gott í stórum pørtum burtursæð frá, tá tað blivu spældir langir høgir bóltar.

*www.nordlysid.fo*

Pauli G. Hansen er farin at venja aftur í vikuni. Orsøkin til, at vit ikki hava sæð so nógv til hansara í seinastuni er hvørki skaði ella leti, var men tí maðurin er í holt við at byggja sær og familjuni eini hús, og tað er eisini onkur ein stór uppgáva.

*www.eb-streymur.com*

Meðan hetta fór fram, noyddist Evrad Ble lata seg skifta út, tí hann hevði fingið ein sundalagsalboga í høvdið, sum gjørdi, at tað fór at mala fyri honum. Tað merkti liðið týðiliga, at Ble fór út.

*www.vikingur.fo*